UTTAN ÚR HEIMI

## Høvdu samband eystureftir

Svenska sjónvarpið hevur avdúkað, at svenski Visntraflokkurin hevði gott samband við teir ráðandi flokkarnar í Sovjetsamveldinum, Eysturtýsklandi, Rumenia og Norðurkorea í sjeyti- og áttatiárunum.

Í einari sending fyrrakvøldið varð sagt, at í 1968 fanst Vinstraflokkurin hvasliga at sovjetsku innrásini í Kekkoslovakia, men kortini luttóku umboð fyri flokkin á kommunistisku floksráðstevnuni í Pahg seinni sama árið. Eisini bleiv avdúkað, at øll árini frá 1975 til 1993 fekk formaðurin í Vinstraflokkinum øl og brennivín frá teirri eysturtýsku sendistovuni, tá hann skuldi halda føðingardag.

Eisini kom fram, at leiðslan í Vinstraflokkinum bað um at verða boðin á floksráðstevnur í Ungarn, Eysturtýsklandi, Rumenia og Sovjetsamveldinum, og at hon fekk innbjóðing hvørja frð. Harafturat hildu umboð fyri floksleiðsluna ofta summarfrí í hesum londunum.

Sjónvarpið kundi harafturat vísa á, at so seint sum á heysti í 1989 sendi Vinstraflokkurin leiðsluni í Eysturtýsklandi eitt fjarrit við ymskjum um góða eydnu í framtíðini og við vónum um, at tann kommunistiska leiðslan í Eysturberlin fór at sita við ræðið í nógv ár afturat. Bara ein mánað seinni fall Berlin-múrurin.

Politiskir eygleiðarar í Svøríki siga, at avdúkingarnar í sjónvarpinum kunnu fáa ringa ávirkan á umdømið hjá Vinstraflokkinum. Umboð fyri flokkin hava sagt, at tann gamla leiðslan mistók seg, og at tað unga ættarliðið má taka við læru av mistøkunum.

## Rætt at gjalda

Í Italia halda teir flestu politikararnir, at tað var rætt at rinda loysigjald fyri at fáa teir iraksku burturflytararnar at lata Simonu Pari og Simonu Toretta leysar.

Formaðurin í utanríkisnevndini hjá tjóðartinginum, Gustavo Selvo, segði í gjár, at høvuðssetningurin eigur at vera, at einki land eigur at slaka fyri burturflytarum, men hann helt kortini, at tað var rætt at gera tað í hesum førinum. Tað týdningarmesta var at bjarga kvinnunum, segði Gustavo Selvo.

Teir flesu politikararnir taka undir við honum, og tað gera teir italsku fjølmiðlarnir eisini. Blaðið La Republica skrivaði í gjár, at tað er eingin skomm at rinda loysigjald fyri at bjarga mannalívum.

Silvio Berlusconi, forsætisráðharri, hevur nnars hildið uppá, at Italia rindaði ikki loysigjald fyri at fáa Simonu Pari og Simonu Toretta leysar. Tað hevur Franco Frattini, uttanríkisráðhari, eisini sagt, men sambært Gustavo Selvo er tað bara "tann almenna frágreiðingin".

Tær báðar kvinnurnar komu til Rom týskvøldið efir at hava verið gíslar hjá irakskum buturflytarum síðani tann 7. september.

## Hann er mín sonur

Amerikanska rockstjørnan Michael Jackson vil vera við, at tann 19 ára gamli norðmaðurin Omer Bhati er sonur hansra.

Alment hitust teir báir fyrstu ferð í Tunis í 1996. Sambært Aftenposten hevur Omer Bhatti ofta búð í marglætishúsunum hjá Michael Jackson í Kalifornia, og blaðið vil eisini vera við, at teir báðir líkjast ikki sørt. Men fólk, sum standa Omer Bhatti nær, siga, at rockstjørnan er ikki pápi hansara. Men tveir menn, sum hava arbeitt hjá Michael Jackson, siga, at tíðindini eru sonn, og at teir báðir umhugsa at viðgera málið í einari bók, sum teir eru í ferð við at skriva um ta umstríddu rockstjørnuna.

Amerikanska sjónvarpið Fox News vil vera við, at bæði Omer Bhatti og næstringar hansara hava fingið pengar hjá Michael Jackson í fleiri ár. Tað vilja hvørki Bhatti ella næstringarnir gera nakrar viðmerkingar til.

# Fuglakrím kann smitta ímillum fólk



*Tað verður torført at basa fuglakríminum. Ein trupulleiki er, at villur fuglur kann bera sjúkuna við sær ímillum lond*

**Nógv bendir nú á, at fuglakrím kan smitta ímillum fólk**

FUGLAKRÍM
*Árni Joenen*
*fartekst@mail.dk*

Í síðstu viku doyði ein kvinna í Teilandi av fuglakrími. Dótur hennara er sjúk av fuglakrími, og teilendsku læknarnir ivast ikki í, at dótturin smittaði mammuna, tí mamman hevði ikki verið í sambandi við fugl.

Tilburðurin hevur fingið teilendsku heilsumyndugleikarnar at fara undir eina umfatandi kanning fyri at fáa staðfest, um dótturin veruliga hevði smittað mammuna, tí er hetta rætt, so er tað fyrstu ferð, at fuglakrím hevur smittað ímillum fólk, skrivar Reuters. Higartil hevur verið hildið, at sjúkan smittar bara frá fugli til fólk.

Í Teilandi verður málið mett so álvarssamt, at stjórnin helt kreppufund um tað í gjár. Aftan á fundin royndi varaheilsumálaráðharrin, Chaturon Chaisang, at sissa fólk.

– Vit kunnu ikki prógva, at sjúkan smittar ímillum fólk, segði hann.

Chaturon Chaisang segði, at bardagin ímóti fuglakríminum kann gerast drúgvur. Hann vísti á, at onnur lond hava roynt at basa sjúkuni tey seinastu tígju árini uttan úrslit. Higartil í ár eru minst 10 fólk deyð av sjúkuni í Teilandi, og í Vietnam hevur fuglakrím kravt minst 20 mannalív teir seinastu níggju mánaðarnar.

Serfrøðingar siga, at enn eru eingi prógv fyri, at sjúkan smittar ímillum fólk, og tí er lítil vandi fyri, at sjúkan fer at breiða seg til aðrar partar av heiminum. Kortini bera teir ótta fyri, at sjúkan kann smitta ímillum fólk, og so kann vandi vera á ferð, um virusið hjá fuglakrímið verður blandað saman við vanligum krímvirusi hjá fólki, siga teir.

Í summar boðaðu seks lond í Asia frá, at tey høvdu staðfest fuglakrím hjá høsnum, og meiri enn 100 milliónir høsnarungar vórðu avlívaðir. Trupulleikin er sambært teilendsku heilsumyndugleikununm, at villir fuglar bera virusið ímillum londini, og tí ber ikki til at basa sjúkuni í einum landi, so leingi hon er í einum av grannalondunum.

# Amerikanska forsetavalið verður ein ruðuleiki

**Felagsskapurin fyri trygd og samstarvi í Evropa, OSCE, væntar nógvar trupulleikar á amerikanska forsetavalinum í næsta mánað**

VAL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyri einum mánað síðani vóru umboð fyri evropsiska trygdar- og samstarvsfelagsskapin, OSCE, í USA og kannaðu ymsar skipanir, sum skulu nýtast í forsetavalinum fyrst í næsta mánað. Umboðini hugdu at tólunum, sum skulu telja atkvøðurnar, og tey kanaðu eisini atkvøðuseðlarnar. Harafturat kannaðu tey kærur frá fólki, sum vilja vera við, at myndugleikarnir skerja møguleikarnar hjá minnilutabólkum at atkvøða.

OSCE skal fyri fyrstu ferð hava eygleiðarar í USA sjálvan valdagin, men longu nú stúrir felagsskapurin fyri, at skilið verður tað sama sum á forsetavalinum fyri fýra árum siðani. Tá var skilið serliga ringt í Florida. OSCE sigur, at valmyndugleikarnir har hava fingið sær nýggjar teljimaskinur, men at tær veita heldur ikki vissu fyri, at alt fr rætt fram.

Umboðini siga eisini, at spurningurin um atkvøðurætt er ógreiður, og tí kann tað væl henda, at fólk sleppa at greiða atkvøðu, sjálvt um valmynduglekarnir ikki hava vissu fyri, at viðkomandi hevur rætt at atkvøða.

Fyri nøkrum døgum síðani fanst fyrrverandi forsetin Jimmy Carter at viðurskiftunum í Florida. Hann heldur tað vera átaluvert, at eingin óheft valnevnd er í statinum.

Á valinum fyri fýra árum síðani tók tað meiri enn ein mánað at fáa staðfest, hvør var valdur til forseta í USA. Endin var, at George W. Bush varð kosin vinnari, tí hann sambært valmyndugleikunum hevði fingið 537 atkvøður fleiri í Florida enn demokraturin Al Gore.

Tann endaliga avgerðin fall í amerikanska hægstarætti, men nógvir demokratar góðtaka framvegis ikki Bush sum lógliga valdan forseta. Demokratarnir hava eisini sagt seg fegnast um, at OSCE sendir eygleiðarar at fylgja við valinum hesaferð. Republikanararnir hava harafturímóti sagt, at tað er óneyðugt.



# Frí ferðsla í Vágatunlinum leygardagin




*Framyvir verða fýra dagar um árið, har til ber at ferðast ókeypis gjøgnum Vágatunnilin. Fyrsti av hesum døgum verður komandi leygardag*

VÁGATUNNILIN
*tíðindaskriv*

Komandi leygardag 2. oktober, verður tað frítt at ferðast gjøgnum Vágatunnilin. Kravt verður ikki upp frá kl 6 leygarmorgunin 2. oktober til kl 6 sunnumorgunin 3. oktober.

Nevndin í felagnum hevur avgjørt, at tað framyvir koma at vera 4 tílíkir dagar um árið, har tað verður frítt at ferðast gjøgnum Vágatunnilin.

Ein av hesum døgum verður í samband við ársdagin fyri upplating av tunlinum, tann 10. dec. Hinir tríggir dagarnir verða lagdir ein leygardag í hvør sínum ársfjórðingi, saman við vinnuni í Vágunum.

Endamálið við hesum tiltaki er, at geva almenninginum høvi at ferðast gjøgnum tunninlin nakrar ferðir um árið fyri einki, samstundis sum vinnan í Vágunum kann nýta høvið til ymiskt virksemi.

# Framsýning í Müllers pakkhúsi

**Í sambandi við, at bøkurnar Havnar søga 1 og 2 koma út, skipar Tórshavnar kommuna saman við Tórshavnar Býarsavni og Føroya Fornminnissavni fyri framsýning í Müllers pakkhúsi**

BÝARSØGA
*Tíðindaskriv*

Søgufrøðingarnir Jens Pauli Nolsøe og Kári Jespersen hava í nøkur ár arbeitt burturav við einum bókaverki um Havnar søgu frá landnámi til okkara dagar. Nú er komið somikið væl áleiðis við arbeiðinum, at fyrsta og onnur bók, ið er um tíðarskeiðið frá landnámi til 1816, verða at fáa til keyps.

Í høvuðsheitum er fyrsta bókin um frásagnir og samtíðarlýsingar av Havnini, fornfrøðiligar rannsóknir í gomlu Havnini, ting- og rættarviðurskifti, bóndagarðin Húsagarð og vinnur hjá havnarfólki, einahandilin fram til umleið 1790 og staðanøvn innan- og uttangarðs í Havnini.

Onnur bókin er í høvuðsheitum um Vágsbotnshandilin 1768-1793, kongliga handilin frá umleið 1790 til 1816, skansaverkið, hospitals- og heilsuviðurskifti, kirkjurnar, skúlarnar í Havn, og hvussu Havnin veksur og mennist fram til umleið 1816.

Høvundarnir hava eisini gjørt eina roynd at endurskapa fólkavøksturin, demografisku gongdina í Havn og í Føroyum í tíðini frá 1600 til 1816.

Havnar søga 1 og 2 er prýdd við nógvum myndum, kortum, skitsum, tekningum og skjølum, sum almenningurin ikki áður hevur sæð. Sumt av hesum tilfari verður endurgivið á framsýningini, har eisini fornlutir eru at síggja.

Jónhild Johannessen, arkitektur, hevur sniðgivið framsýningina. Dekostovan hevur staðið fyri grafisku uppsetingini.

Framsýninigin í Müllers pakkhúsi er opin frá 1. oktober til 24. oktober, seinnapartin.



